# Ófriðarlig børn og órógvandi foreldur á skránni

**Tað eru ikki ófriðarligu børnini, sum bila, men tær umstøður, vit bjóða teimum. Foreldur og samfelag mugu taka uppgávuna í størri álvara. Hetta var boðskapurin á stórari ráðstevnu á Læraraskúlanum um vikuskiftið.**

RÁÐSTEVNA
*Rigmor Dam*


*Lene Lind, pedagogur*

Summi børn fylla so nógv á dagstovnum og í skúlunum, at stórur partur av tíðini hjá starvsfólkunum gongur við at fáa tamarhald á teimum. Tí er hetta ein trupulleiki, sum kjakast verður dúgliga um, tá fólk innan starvsøkið hittast.

Tí skipaði Føroya Læraraskúli í vikuskiftinum fyri megnar ráðstevnu, har evnið var "ófriðarlig børn og órógvandi foreldur." 320 fólk, sum dagliga arbeiða innan barnaøkið í Føroyum, vóru savnað í Auluni, har tey eitt nú hoyrdu navnframu donsku barnatalsmennirnar Erik Sigsgaard og John Aasted Halse. Endamálið við ráðstevnuni var at fáa íblástur og hugskot til arbeiði við ófriðarligum børnum.

### Børnunum bilar einki

At børn eru øðrvísi í dag í mun til fyrr, er eingin loyna, men hví er hetta so, og hvat kunnu vit gera við tað? Hvør hevur ábyrgdina av hesum og hvussu venda vit gongdini? Hetta vóru nakrir av teimum spurningum, sum settir vórðu, og sum ymsu fyrilestrarhaldararnar royndu at svara. Og eitt, sum fleiri ferðir varð ført fram, var, at børnunum sum heild bilar einki, men tær ansingar- og skúlaskipanir, vit bjóða teimum, ikki nøkta tørv teirra, samstundis sum nógv foreldur ikki hava gjørt sær greitt, at tíð og orka eru hornasteinar í einum og hvørjum foreldraleikluti. Sum ein so rámandi tók til, so eru nøkur foreldur, sum høvdu verið betur egnaðið sum ommur og abbar, tí tey ikki megna ella hava hug at taka á seg tær minni hugnaligu uppgávurnar í samband við børnini, so sum at viðgera ósemjur og tvídráttir.

### Vit biða sjálvi um ófriðarlig børn

Erik Sigsgaard, sum í skjótt ein mannsaldur hevur tikið lut í orðaskiftinum um barnauppaling og rættindini hjá børnum, hevur í stórari verkætlan kannað, í hvønn mun og hvussu ofta børn verða skeldaði á stovnum. Hann sigur, at børn, sum verða nógv skeldaði heima, eisini verða nógv skeldaði á stovnum og dagrøkt. Hetta ger børnini uppaftur meira órólig; tey lurta ikki ella gerast harðlig. So verða tey deild uppaftur meira, og ónda ringrásin gerst veruleiki.

Á ráðstevnuni vendi Erik Sigsgaard trupulleikanum ímóti okkum vaksnu, og segði, at tá vit hava skipað barnaøkið við stovnum og skúlum, sum í veruleikanum als ikki hóska til nútíðar barnasinnið, so er tað í stóran mun okkum sjálvum fyri at takka, at so nógv børn eru órólig. Innan stovns- og skúlaøkið er ikki nógv menning ella broyting farin fram seinastu nógvu árini, samstundis sum vit ikki hava gjørt okkum greitt, at børn í dag liva uttanfyri heimini í nógv fleiri tímar. Fyri fimmti árum síðani vóru børn 7.000 tímar á stovni og í skúla, meðan tey í dag eru 25.000 tímar heimanifrá.

Eitt nú segði hann um skúlarnar:

– At savna 24 javngomul børn á seksti fermetrum, 45 minuttir í senn, er óðamannaverk. Ei undur í, at børnini gerast órólig.

### Ófriðarlig børn á stovnum

John Åsted Halse, sum er formaður fyri Børns Vilkår í Danmark, greiddi frá einari kanning um órólig børn á stovnum, sum felagið hevur staðið fyri. Úrslitið av kanningini vísti, at 13 prosent av børnum á stovnunum eru ófriðarlig. Hann segði, at vit ikki í nóg stóran mun hava gjørt okkum greitt, at umstøðurnar hjá børnum í dag eru nógv broyttar í mun til fyrr, og at vit ikki hava skipað umstøðurnar hjá børnum svarandi til nútíðar samfelagið. Tí samstundis sum børnini eru vorðin alt meira sjálvstøðug, hava virkin foreldur og sum heild liva eitt sunt lív, so eru nógv børn, sum eru órólig, strongd, kenna seg til yvirs, og sum liva eitt sera ósunt lív. Tí er uppgávan hjá fólki, sum starvast við børnum, eisini broytt nógv, og vit eiga at gera okkum greitt, at bæði foreldur og starvsfólk hava ábyrgdina av trivnaðinum hjá børnunum.

### Fjølbroytt ráðstevna

Fleiri aðrir fyrilestarhaldarar vóru, so sum Svend Bak, høvundur til bókina "Tætte relationer", John Engelbrecht, heimspekingur og skemtari, Lene Lind, pedagogur og m.a høvundur til bókina "Forstå mig dog," og Hildur Patursson, pedagogur og serlærari, sum røddi um umsorgan og læru.

Vit fara næstu dagarnar at viðgera evnið meira gjølla, eitt nú við samrøðum við teir báðar Erik Sigsgaard, cand. ped.ped. barnagranskara, lektor og rithøvund av m.a. "Skæld ud,"og John Aasted Halse, cand.ped. og cand.psyk. og formaður fyri Børns Vilkår í Danmark.




# Evropiski búskapurin í framgongd

MARKNAÐARRÁK

Nú tíðarskeiðið við roknskaparkunngerðum er um at vera av, á hesum sinni, hevur farna vika verið tunnligt við tíðindum. Ikki fyrr enn hósdagin í farnu viku vóru fyrsta áhugaverda búskaparliga uppgerðin kunngjørd. Talan varð m.a. um amerikanska handilsjavnan, ið fall úr -39,5 milliardir dollarar í -43,3 milliardir. Onnur uppgerð, talið av teimum, ið søkja um dagpening, gjørdist eitt vet verri enn væntað, hóast talið sum heild var gott.

Vánaliga gongdin í handilsjavnanum fekk ávirkan á dollaran, ið viknaði mótvegis evruni. Verður hugt eftir vikuni sum heild, er evran og danska krónan sostatt styrknaðar gott 2% mótvegis dollaranum. Ein slík gongd er tálmandi fyri búskapin, og hetta er ein av orsøkunum til, at donsku lánsbrævarenturnar sum heild lækkaðu í farnu viku.

Sum kunnugt hava kunngjørdu roknskapirnir, sum heild víst á eina góða gongd í inntøkunum. Hinvegin hevur vantað við útlitismetingum. Í farnu viku kom at kalla vend í, tá m.a. virkini GE og IBM kunngjørdu bjartar framtíðarvónir. Samstundis kunngjørdi Deutsche Telekom og Siemens góðar roknskapir. M.a. hesi viðurskifti elvdu til, at partabrøv hækkaðu í farnu viku.

Líkt er til, at tað hóast alt glógvar í evropiska búskapinum. Eftir at evropiski búskapurin seinastu tríggjar ársfjórðingarnar hevur staðið í stað ella hevur havt afturgongd, vísta tøl, at hesin vaks 0,4% í 3. ársfjórðingi. Hetta er lágur vøkstur, men eitt fet rætta vegin. Marknaðarrák metur, at vøksturin komandi tíðini verður á lágum stigi og at tískil skal ikki roknast við evopiskar rentuhækking í bræði.

Áhugaverastu roknskapirnir í vikuni verða teir frá Hewlett-Packard og HomeDepot. HomeDepot kann sammetast við ein timburhandil og úrslit og væntanir teirra kunnu siga nakað um virksemið í USA. Úr Danmark kunngera Coloplast, Jyske Bank og ISS.

Fleiri áhugaverd lyklatøl verða kunngjørd í vikuni, millum annað prísvakstrartøl úr USA og Evropa, álitistøl og tøl fyri dagpeningaumsøknir úr USA. Tískil kann væntast, at virkan gerst óstøðug. Í farnu viku lækkaðu renturnar, men vit meta tað vera sannlíkt, at rákið við hækkandi rentum verður at síggja aftur hesa vikuna; hetta vil tó verða tengt at gjaldoyragongdini. Heldur evran áfram at styrkjast, kunnu renturnar fella meira.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,88% | -0,18% |
| 5 ára lánsbræv | 3,69% | -0,20% |
| 10 ára lánsbræv | 4,51% | -0,14% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 248,5 | -2,8% |
| OMX, Svøríki | 620,2 | 0,3% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.551,8 | -0,5% |
| S&P 500, USA | 1.050,4 | -0,3% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,59 | 0,4% |
| Evru Lánsbrøv | 163,38 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 73,89 | 1,3% |
| Altjóða Partabrøv | 73,30 | -1,9% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 629,21 | -2,9% |
| EUR | 743,88 | 0,0% |
| GBP | 1.063,46 | -1,7% |
| NOK | 90,55 | -0,1% |

*Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



Annað lív hjá tannáringum úr Klaksvík:

# Ruraðir í blund á sjónum

SKÁLABERG
*Annika Steintórsdóttir*
*Biskopstø, Starvsnæmingur*

**Hesar seinastu dagarnar hevur tíðin mest sum staðið í stað, siga teir báðir Bergur Mikladal og Jón Jacobsen, sum seinastu tíggju vikurnar á opnum havi hava verið til verka umborð á nýggja Skálaberg**

- Tùrurin hevur verið drúgvur, men kortini góður og eitt veruligt minni fyri lívið, eru báðir samdir um. Fiskiskapurin var eitt sindur slakur í fyrstani, men seinastu vikurnar hevur gingist væl so teir báðir klaksvíksingarnir kunnu síggja fram til eina hampuliga avrokning, tá ið fiskurin er seldur.

Tað eru fáir sjómenn, sum hava gjørt sín fyrsta túr umborð á einum so stásiligum og nýmótans skipi. Umstøðurnar umborð á Skálaberg eru av teimum allarbestu og hjá ungum sjómonnum er hetta eitt skip, sum gravgangur er at sleppa við. Í fríløtunum hugnaðu teir sær í messuni, teir hugdu í sjónvarp ella sótu teir framman fyri telduskýggjan. Eisini bar til at royna mongu maskinurnar í venjingarhølunum. Og sum vera man ber altíð til at práta og hugna sær á annan hátt.

### Ikki sjómenn sum vaksnir

-Nei, eg ætli mær ikki til sjós aftur og havi sagt kjansin frá mær næsta túr, greiðir Jón Jacobsen frá. Og hóast Bergur heldur ikki ætlar sær at gerast sjómaður burturav, sigur hann, at aftaná nakrar túrar afturat við Skálabergi fer hann væntandi at royna seg á landi.

- Tað er sjálvandi ein løgin kensla, at eg í hálvan triðja mánað ongantíð setti fótin á fasta jørð, sigur Bergur, og Jón leggur afturat, at teir hóast alt kortini vandi seg við hetta og tað rullið sum er á sjónum.

Í fyrstani sloppu teir, sum so mangir aðrir sum royna sjólívið og hvat tað merkir ikki at hava fast undir fótum. Bergur og Jón blivu eisini ruraðir í blund um kvøldarnar, arbeiðið var hart og kalt og onkuntíð tóktist tíðin mest sum at standa í stað.

Men eisini umborð á skipi gongur klokkan og dagnarnir styttast eins og á landi.

At fara frá skúlabonki til skips kann verða stór broyting í lívinum. Men eisini tað harða arbeiðslívið gert gerandisdagur. Bergur lærdi seg skjótt at reinskera fiskin, meðan Jón stóð seg væl sum frystari úti á Barentshavinum.

Hvørki hjá Bergi ella Jón bilti tað við sjóverki. Bara teir fyrstu dagarnar og teir dagar tá ið veðrið av álvara leikaði hart á. Men tað er gott at vera heima aftur eru báðir unglingarnir úr Klaksvík púra samdir um.

# Stuðul til fiskivinnuroyndir

**Tíðindaskriv**
*Fiskirannsóknarstovan*

10. november var freist at søkja Fiskivinnuroyndir um stuðul til verkætlanir. 33 umsóknir komu inn.

Søkt verður um eina samlaða upphædd uppá kr. 9.068.637. Verkætlanirnar hava ofta ein part av fíggingini sum eginfígging og kann onkutíð harafturat vera talan um aðra fígging eisini (evt. útlendska). Verkætlanirnar hava tí eitt størri virði enn tað latið verður í stuðli frá FISKIVINNUROYNDUM. Samlaða virðið á verkætlanunum er mett til í minsta lagi kr. 13.907.616. Á myndini er lutfallsliga fíggingin avmyndað. Fiskivinnuroyndir stendur fyri 64 % av metta virðinum.




Umsøkjarar kunnu vera vinnufyritøkur, feløg, almennir stovnar og einstaklingar. Býta vit umsóknirnar eftir hesum síggja vit at:

Vinnufyritøkur standa fyri 10 umsóknum

Almennir stovnar 18 umsóknum

og einstaklingar 5 umsóknum

Raðfestu økini eru í ár 7 í tali. 6 fakøkir og sum tað nýggja tiltakið hesuferð: Vinnugranskaraskipanin.

Býta vit umsóknirnar á økini er myndin henda:

Býtið av umsóknum á á raðfest økir

Fiskiskapur við ábyrgd 37%

Gagnnýtsla av øllum 21%

sjómatartrygd og nøgdsemi brúkarans 18%

Virðisøking av upsatilfeinginum 0%

Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni 12%

Heilsa, trygd og Umhvørvi 3%

Vinnugranskarar 9%

Um vit sammeta við árið í fjør, eru fleri áhugaverd viðurskifti.

• Samlaða talið av umsóknum er nakað minni í ár (33) í mun til í fjør (38). Men hinvegin er dygdin í umsóknunum væl betri hesuferð. Tilvitanin um, at tað er kapping um pengarnar ger, at umsøkjarin ger sær størri ómak við hugskotinum, fyrireikingunum og neyðugu skjalprógvunum.

• Vinnufyritøkur síggja eisini, at tað er ein fyrimunur at hava nakað av eginfígging við í umsóknini, og tí sæst ein lutfallsligur vøkstur í eginfíggingini, har vinnufyritøkur eru umsøkjararar.

• Almennir stovnar eiga tó enn lutfallsligu størstu rúgvuna av umsóknum, og tað sær ikki út til at minka, heldur tvørturímóti.

• Tað tykist ikki at verða nakar áhugi fyri at gera verkætlanir innan virðisøking av upsatilfeinginum. Kanska hongur hetta saman við, at upsaprísurin er so metlágur, at fyritøkur og stovnar eru eitt sindur mótleys í løtuni.

• Tað tykist at vera ein vaksandi áhugi fyri teimum nýggju økjunum: Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og Heilsa, trygd og Umhvørvi.

• Tað er at fegnast um, at tikið er so væl ímóti nýggju skipanini við vinnugranskarum í vinnulívinum.

Fiskivinnuroyndir er ein játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum hevur til endamáls at stuðla undir gransking og menning í fiskivinnuni. Málsviðgerðin av umsóknunum um verkætlanir fyri 2004 verður liðug til jóla.

# Broyting í Mustad-umboðan

UMBOÐAN
*Tíðindaskriv*


Finn Baldvinsson
*MUSTAD servica*
Poul A Mikladal
*Marknaðarleiðari*
Jákup Mikkelsen
*Stjóri*

Kjølbro Heilsøla hátíðarheldur í hesum døgum eitt ára dagin fyri yvirtøku av Mustad egningarmaskinunum í Føroyum.

Hóast tað, so heldur stjórin, Jákup Mikkelsen, tað ikki vera tíð til at taka sær av løttum og hevur boðað frá broytingum fyri at betra og arbeiðsgongdina meira munadygga. Frá 1. desember verður sølan av maskinum, eykalutum, línum og húkum samaløgd og stjørnað av einum persóni, heldur enn av trimum, sum skipanin er í løtuni. Tað verður framyvir Finn Baldvinsson, ið átekur sær hesar skyldur. Uppseting og umvælingar verða gjørdar av POMEK, sum sendir nakrar mans til Noregs at fáa sær kunnleika og royndir.

Stórar broytingar eru eisini nýliga gjørdar á høvuðsdeildini hjá Mustad í Noregi. Bæði Leif Erich Dørffel og Svein Erik Bakke, sum fleiri føroyingar hittu á framsýningunum í vár og á fiskistevnuni í Runavík, eru farnir frá Mustad, og John Ragnar Larsen hevur tikið ábyrgdina av søluni í Føroyum.

Poul Andrias Mikladal hevur fingið tøkk fyri sítt góða arbeiði at samskipa marknaðarføringina av Mustad og at seta upp eina 24-tíma tænastu. Eisini hevur hann gjørt eitt grundleggjandi arbeiði fyri at fáa Mustad umboðanina at virka. Hann heldur fram sum marknaðarleiðari á Kjølbro Heilsølu við serligum atliti til at fáa fyritøkuni ISO9000 status.